HB-EB/Streymur 7-1 (2-0):

Sól og summar í Gundadali

HB vann ein knúsandi 7-1 sigur á EB/Streymi, tá sessurin í hálvfinaluni í steypakappingini skuldi tryggjast

LØGMANSSTEYPIÐ
Jákup Mørk, jakup@sosialurin.fo

Hóast veðrið var av tí allar besta, so gjørdist talan ongantíð um nakra sanna fótbóltsveitslu, tá HB og EB/Streymur hittust í Gundadali. Málveitslu – kanska – tí HB-viðhaldsfólkini høvdu í øllum førum sjey orsøkir at fegnast, men tann stóri fótbóltsdystin gjørdist talan so ongantíð um.

Miseydnað verjuskipan

Í mun til tað, sum vanliga verður roknað sum idealuppstilling, hevði EB/Streymur gjørt eina hampuliga stóra umskipan til dystin.

Andrzej Pacek fekk nevnliga reytt kort, tá EB/Streymur fyri viku síðani fekk javnleik móti HB, og í hansara stað hevði Piotr Krakowski valt at seta Sorin Anghel. Ivaleyst sum eina roynd at hava eina góða skipan í verjuni, men lat tað bara vera sagt, at tann royndin miseydnaðist fullkomuliga.

Saman við einum hálvskaddum Fróða Clementsen megnaði Sorin ongantíð at fáa skil á verjuspælið, og tó at HB ikki veruliga fekk sett trýst á, so lá tað alla tíðina í luftini, at her fór at enda galið.

Og tað gjørdi tað so eisini tvær ferðir innan tveir minuttir, og hvørja ferðina tóktist verjuspælið hjá gestunum serliga sannførandi.

Hetta tók líka sum luftina úr dystinum, og ferðin – sum undan hesum hevði verið lág – fór nú heilt niður í botn.

Viljaleyst gestaavrik

Eftir steðgin umskipaði EB/Streymur liðið nakað, og eina lítla løtu tóktust teir aftur at vilja stríðast fyri sínum møguleika. Eisini hóast HB kom upp á 3-0 eftir einum korteri, og tá Hans Pauli so minkaði við eini frísparksperlu, hómaðist ein veruligur vilji.

Men hesin var tó ikki so leingi. HB hevði nú veruliga fingið sjálvsálitið í lagi eftir nøkur vánalig avrik í landskappingini, og tó at verjan eina løtu skinkladi nakað, so helt hon.

Og so fall alt enn einaferð saman hjá EB/Streymi. Tað plagdi annars ikki at vera teimum fyri, men eins og í landskappingardystinum móti B36, so fóru leikararnir mentalt av vøllinum, eftir at HB hevði skotið fjórða málið. Og so kundi dysturin annars akkurát tað sama endað 10-5 sum nakað annað. HB spældi seg leikandi lætt ígjøgnum gestaverjuna, og tá HB-verjan so eisini fór at sova seinasta korterið, var víðopið í báðum endum. Her var munurin bara tann, at HB megnaði at gera nyttu úr nøkrum av sínum møguleikum, meðan EB/Streymur ikki megnaði tað, og so endaði alt við eini eyðmýking fyri gestirnar, meðan HB fekk eitt ógvusligt sálarligt lyft.

Trupult er at spáa

Spurningurin er so, hvørja nyttu liðini duga at draga úr dystinum í strembanini frameftir. Her hevur HB sjálvandi framvegis møguleikan í steypakappingini, sum teir aloftast standa seg framúr væl í, og við tveimum hálvfinalum móti VB, skuldu møguleikarnir at komið víðari at verið góðir.

Og so vóna tey í HB helst eisini, at liðið kann gagnnýta sálarligu ávirkanina av stóra sigrinum. Tað er í øllum førum tørvur á tí, um liðið skal klintra upp í oddin, men sum útvarpsmaðurin endaði frásøgnina, so er torført at spáa – og serliga um HB.

Hjá EB/Streymi ræður nú fyrst og fremst um at leita aftur til røturnar. Eitt er, at liðið so syngjandi fór úr steypakappingini, men tað í sjálvum sær er neyvan nøkur vanlukka.

Verri tykist vera, at stríðsviljin, sum áður hevur eyðkent liðið, nú tykist vera horvin. Tvær ferðir av trimum hava teir í øllum førum givið skarvin fullkomuliga yvir, og sleppur hetta máttloysi at festa røtur í sinnunum á leikarunum, verður talan í øllum førum um eitt strævið kappingarár fyri teirra viðkomandi.

Sorin Anghel leikti fyrra hálvleik í verjuni, men hetta var ein alt annað enn væleydnað umskipan, og í seinna hálvleiki var hann aftur í álopinum
mynd: Álvur Haraldsen

Ov bangnir

Tað er neyvan ov nógv sagt, at einasti av EB/-Streymur leikarunum, sum av røttum kundi standa við sítt avrik, var Hans Pauli Samuelsen. Ferð eftir ferð var hann maðurin, sum við fiksum fintum og góðum sendingum skapti órógv í HB-verjuni, men samanlagt var hetta tó ongantíð nóg mikið til at skala trygga HB-sigurin.

Og hóast góða avrikið, so var tað heldur ikki ein serliga nøgdur Hans Pauli, sum vit fingu orð á eftir dystin.

- At vit soleiðis geva upp, er ikki gott nokk. Líka mikið, hvussu støðan er, so skal mann sjálvandi altíð stríðast víðari, men hetta er so sama søgan, sum tá vit vóru í Havn seinast. Vit fáa býtt mál ímóti okkum, og so fella vit bara í fátt.

Men tað er jú ikki tað at fella í fátt, sum tú vanliga setir tykkara lið í samband við?

- Nei. Avgjørt ikki. Í fjør stríddust vit hvønn tann einasta dyst, men tað tykist, sum eru vit meira bangnir í ár. Tað er so nakað, sum vit mugu arbeiða við komandi dystirnar, staðfesti Hans Pauli Samuelsen eftir dystin.

-jm

Havnarveður



Vagnur Mohr Mortensen er ein av teimum yngru HB-leikarunum, sum í ár veruliga hevur bitið seg fastan í hópinum. Saman við Símuni Eliasen mannaði hann leygardagin HB-miðverjuna, og sum vera man, so var hann væl nøgdur um úrslitið av dystinum.

- Tað er veðrið. Í dag er havnarveður, og so vinna vit!

- Nei, tað veit eg ikki, men tað er so í øllum førum ein staðfesting, at vit hava trupulleikar, tá veðrið ikki er av tí besta, men tað bilti so ikki í dag.

Veður ella ikki, so er tað ein staðfesting, at sjey HB-mál vórðu skotin, og av hesum vóru tey fýra beinleiðis eftir deyðbóltar. Ein dygd, sum liðið eisini hevði vant undan dystinum.

- Vit hava einki mál fingið upp á deyðbóltar higartil í ár, og tí hava vit vant hendan partin sera nógv seinastu vikuna. Tí var tað eisini hugaligt at síggja, at hetta gav úrslit, sjálvt um bakgrundin í summum førum tóktist bílig.

Og eg kann ætla, at ein slíkur sigur var júst tað, sum tit høvdu tørv á, nú úrslitini í landskappingini ikki hava verið so góð?

- Sjálvandi. Vit vistu allir í dag, at vit høvdu nakað at prógva. Og eg haldi eisini, at eg undan dystinum visti av, at vit fóru at vinna, so hetta var avgjørt ein týdningarmikil psykologiskur sigur hjá okkum, segði altso Vagnur Mohr Mortensen at enda.

Málini

1-0: HB fær innkast í høgru. Rógvi snittar bóltin víðari inn í málteigin, har Heðin á Lakjuni nikkar niður móti nærmasta stólpa.

2-0: Langt útspark endar við at Sorin Anghel og Gunnar á Steig misskilja hvønnannan, og so kann Rógvi troka seg ígjøgnum.

3-0: HB hevur hornaspark í høgru, og har er Símun Eliasen hægstur og stútar bóltin inn.

3-1: Hans Pauli Samuelsen vinnur sjálvur fríspark á brotsteigarmarkinum, og hetta sendir hann hegnisliga upp um múrin og í kassan.

4-1: Eftir hornaspark í vinstru heilfluktar Hallur Danielsen við vinstra beininum, og so er Hendrik Rubeksen kvikur at stinga fótin fram.

5-1: Enn einaferð er talan um deyðbólt, og hesa ferð er Heine Fernandez seinastu maður at skjóta, eftir at bólturin hevur ferðast eitt sindur aftur og fram í brotsteiginum.

6-1: Heine Fernandez og Gert Hansen kappast um HB-innlegg úr høgru, og eftir at Heine fyrst hevur fótin á, endar alt við at Gert skumpar bóltin seinasta pettið í málið.

7-1: HB-uppspælið er enn einaferð í høgru, og tá bólturin kemur innfyri, er Rógvi hægstur og stútar í kassan.

FAKTA

HB-EB/Streymur 7-1 (2-0)
1-0: Heðin á Lakjuni, 16.
2-0: Rógvi Jacobsen, 18.
3-0: Símun Eliasen, 61.
3-1: Hans Pauli Samuelsen, 66.
4-1: Hendrik Rubeksen, 74.
5-1: Heine Fernandez, 75.
6-1: sjálvmál, 77.
7-1: Rógvi Jacobsen, 90.

HB: Pól N. Joensen – Hallur Danielsen, Vagnur M. Mortensen, Símun Eliasen, Janus M. Joensen – Kári Nielsen, Martin Christensen, Rógvi Jacobsen, Heðin á Lakjuni – Heine Fernandez, Hendrik Rubeksen (Rókur F. Jespersen, 78.)
EB/Streymur: Gunnar á Steig – Carl H. Høgnesen, Sorin Anghel, Fróði Clementsen (Gert Hansen, 34.), Johan á Stongum (Ólavur Poulsen, 77.) – Bárður Olsen, Knút Vesturtún, Jákup Martin Joensen, Hallur Jacobsen (Høgni Hansen, 77.)– Hans Pauli Samuelsen, Sonni L. Petersen
Gul kort
HB: Eingin
EB/Streymur: Jákup M. Joensen, 48
Dómari: Suni Johansen. Hevði gott tak á.

Gøtumenn royndu støðugt at bróta niður væl skipaðu NSÍ-verjuna. Hetta eydnaðist ongantíð, og í longdu leiktíðini slerdi NSÍ so kontra

GÍ–NSÍ 0–1 (0–0):

NSÍ snýtti gøtumenn

Skiftisspælari gjørdist hetja, og so gjørdi tað minni, at hann í síðstu løtu noyddist av vøllinum

LØGMANSSTEYPIÐ
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Fyri 19 ára gamla Andy Olsen varð seinnaparturin leygardagin minnisríkur í Gøtu. Tá ið tað restaðu ellivu minuttir, varð hann skiftur inn. Tað tók einki nýtt. Í fjør var hann við í tólv landskappingardystum. Bara í fýra av teimum var hann við frá fyrsta brìksli. Hesa ferð loysti hann Jónstein Petersen av. Tað sóu gøtumenn sum ein lætta, tí teir mettu Jónstein sum eitt tað besta álopsvápnið hjá NSÍ. Men í síðsta enda vísti innskiftingin av Andy Olsen seg at koma væl við.

Einki mál kom í vanligu leiktíðini. GÍ megnaði ikki at spæla seg til upplagdar málmøguleikar. NSÍarnir vóru tættir í verjuni, har Messias Perreira eftir leikligan aldudal og fleiri ferðir á bonkarendanum aftur hevði fingið møguleikan, og so dúvaðu teir ofta upp á stikkbóltar fram ímillum. Gøtumenn fingu ikki glið á miðvallarspælið. Popczynski kendi seg ofta noyddan at fara aftur á vøllin fyri at fáa samband millum keturnar. Harvið gjørdist Vitus Kofoed einsamallur á toppinum, og tað var ikki so heppið.

Nýggja ílogan hjá GÍ hevur higartil ikki víst seg at vera púra uppløgd. Dygdirnar hjá nýggja álopsmanninum eru avgjørt ikki at temja og halda upp á bóltin, meðan bíðað verður eftir stuðli aftanífrá. Tað var hetta, sum tað oftast var neyðugt við leygardagin. Vitus Kofoed er heldur typiskur bokksspælari. Tær dygdirnar var eingin møguleikí at gera nakað burturúr leygardagin. GÍ megnaði rættuliga sjáldan ella mest sum ongantíð at koma í sovornar støður.

Merkisvert var tað, at tá ið GÍ royndi at tiltuska sær yvirvágina, sum teir vónaðu skuldi bera sigursmálið og harvið hálvfinaluplássið við sær, tóku teir álopsmannin út. Í eykatíðini fekk innskifti Poul Arni Jacobsen ein møguleika, men stútarin var ikki nóg neyvur, og Jens Martin Knudsen, sum fyri fyrstu ferð í ellivu ár hevði leitað topphúgvuna fram aftur, var ongantíð settur á serligar royndir.

Andy í miðdeplinum

Einki var at siggja til Helga L. Petersen, sum annars hevur verið fremsti álopstrumfurin seinastu árini. Teir triggir í fremstu røð – Gert Langgaard, Jústinus R. Hansen og Jónstein Petersen – eru allir heldur miðvallarar enn álopsspælarar.

Tað gjørdi góðan mun, at Ian Højgaard var á miðvøllinum, og hesa ferð spældi Aleksandar Jovevic í næstan 70 minuttir.

NSÍ møguleikarnir vóru rættuliga fáir, men tá ið innskifti Andy Olsen fekk ein, var tað nóg mikið. Í umdystinum leyp GÍ høvuðleyst á við nógvum fólki. Fleiri ferðir kundi Jens Martin við bleytum útspørkum seta vandamikil mótálop í gongd.

Í hesum førinum stakk ein annar av nýggjaru NSÍ monnunum, Jústinus R. Hansen, stakk fram í høgra borð, Andy Olsen sneiddi framvið mótstøðumanninum, vinkulin tóktist at gerast í so spískur, tá ið hann kom í brotsteigin, og fyritreytirnar vóru einki serligar, tá ið tað var kalda høgra beinið, sum skuldi brúkast. Men Andy rakti væl, og bólturin fór flatt framvið Halli Hansen og í handara síðunetið.

Ógvusligur rómur innan fyri vøllin, meðan heimaáskoðararnir ytru megin stóðu sum kánus. GÍ gjørdi alt fyri at spíska seg, og NSÍ ofraði seg. Í tólv landskappingardystum í fjør fekk Andy Olsen einki gult kort. Ta løtuna, hann leygardagin var á vøllinum í Sarpigerði, sá hann gult tvær ferðir og harvið reytt. Tað vil við øðrum orðum siga, at hann verður ikki tøkur, tá ið NSÍ sunnudagin skal spæla landskappingardyst á heimavølli, men tað munnu hann og liðfelagarnir ikki leggja so nógv í. Eftir trilvandi fyrstu umfør í landskappingini og einki serligt bólkaspæl í steypakappingini er NSÍ komið í hálvfinaluna.

Fakta um dystin

GÍ–NSÍ 0–1 (0–0)
0–1: Andy Olsen 117.
Dómari: Páll Augustinussen
GÍ: Hallur Hansen – Leivur Hansen, Atli Gregersen, Poul Ennigarð, Poul Henning Jacobsen – Hans Pauli Petersen, Súni Olsen, Símun Louis Jacobsen, Magnus Skoralíð – Krzystof Popczynski, Vitus Kofoed (Poul Arni Jacobsen, 70.)
Gult kort: Súni Olsen, Vitus Kofoed, Hans Pauli Petersen, Atli Gregersen, Poul Arni Jacobsen
NSÍ: Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Messias Perreira, Sjúrður Jacobsen – Ian Højgaard, Kári Hansen, Aleksandar Jovevic (Eddie Mikkelsen, 69.) – Gert Langgaard (Dánial Hansen, 80.), Jústinus R. Hansen, Jónstein Petersen (Andy Olsen, 85.)
Gult kort: Kári Hansen
Reytt kort: Andy Olsen 119.

Tað ráddi um at halda tætt

NSÍ venjarin, Jógvan Martin Olsen, var ovurfegin eftir steypasigurin. Eitt er hálvfinaluplássið og tveir spennandi dystir ímóti ÍF. Men Jógvan Martin leggur meiri í avrikið enn so:

– Hjá okkum ráddi tað fyrst og fremst um at halda tætt í verjupartinum. Har hava vit havt stórar trupulleikar higartil. Leygardagin megnaðu vit fyri fyrstu ferð í ár at fara av vøllinum, uttan at mótstøðuliðið hevði fingið mál. Avrikið og úrslitið vóni eg fara at bera við sær, at spælið fer at gerast betur. Higartil hevur tað als ikki riggað, staðfestir NSÍ venjarin.

Helgi L. Petersen var ikki hundrað prosent klárur. Tí valdi venjarin at halda honum uttanfyri.

– Faktiskt spældu vit við trimum miðvallarum í álopinum. Vit hava ikki aðrar møguleikar. At vit hildu tætt í verjupartinum hevði við sær, at tað var nóg mikið, at vit sjálvir skoraðu eitt mál.

-jm